# GÓÐU TILBOÐINI HALDA ÁFRAM

## AALBORG PORTLAND sement á goymslu




fyri sekkin á 40 kg. avmarkað nøgd **kr. 79,-**

## GARAGUHURÐAR



*Søla og tænasta*

## HERREGAARDS-, HJERTING- OG AÐRAR BETONGFLÍSAR





**-10%**
*fyri vørur á goymslu*

## HVÍTVØRUR

**-20%**

Heiðavegur · 600 Saltangará · Tel 44 75 60
Fax 44 84 60 · www.klementpetersen.fo

pf Klement Petersen

Sosialurin 341800

# Tørvar tær

vælgjørdan timburmann, ring so til

**J. T. D.-smíð**
**v/ Hera Thomsen, timburmeistari**
**Tlf. 219318/319318**

# Tannlækni

Við hesum verður søkt eftir tannlækna til tannlæknastovuna á Skála, at byrja 1. januar 2006 ella skjótast gjørligt eftir hendan dag.

Á tannlæknastovuni verða árliga viðgjørd uml. 500 børn og ung millum 0 og 16 ár.

Lagdur verður stórur dentur á dygd, góða tænastu og góð samstarvsevni.

Løn og setanartreytir sambært galdandi sáttmála.

Øll viðgerð fer fram á væl útgjørdu tannlæknastovuni á Skála, har tveir klinikkassistentar eru í starvi, ein fulla tíð og ein hálva tíð.

Sambært leigusáttmála millum tannlæknan og kommununa, fær tannlæknin fullan nýtslurætt yvir tannlæknastovuni, sum harvið eisini gevur møguleika til privata praksis.

Eftir nærri avtalu við núverandi tannlækna, er møguleiki fyri at yvirtaka hansara privata praksis.

Um tygum vilja hava fleiri upplýsingar, eru tygum vælkomin at venda tygum til borgarstjóran Rodmund Nielsen á tlf. 417000.

Umsóknir við viðkomandi upplýsingum skulu sendast til:

Runavíkar Kommunu
Postsmoga 139
Heiðavegur 26
600 Saltangará

att. Rodmundur Nielsen, borgarstjóri

í seinasta lagi 21. november 2005.

**Runavíkar kommuna**

**Húsa- og Syðradals kommuna**

# Almenn byggisamtykt

Við hesum verður kunngjørt sambært reglurnar í Løgtingslóg um býarætlanir og byggisamtyktir (lóg nr. 13 frá 21. mai 1954 við seinni broytingum) 26. september 2005 at broyting av almennu byggisamtyktini fyri Húsa- og Syðradals kommunu verður løgd alment fram á kommunuskrivstovuni, har hugt kann verða eftir uppskotinum eftir avtalu til 20. desember 2005.

**Broyting er:**
Partur av grundøkið niðanfyri landsvegin sunnanfyri kvíggjaránna matr. nr. 62 á Húsum verður lagt til vinnuendamál.

Mótmæli ella broytingaruppskot mugu vera bygdaráðnum í hendi í seinasta lagi 20. november 2005.

**Húsa- og Syðradals Kommuna**

VØGGUSTOVAN OG BARNAGARÐURIN Á KONMANSMÝRU

# Pedagogar

Vøggustovan á Konmansmýru søkir eftir 3 pedagogum at starvast millum 25 og 40 tímar um vikuna.
Eitt starv skal setast 01.12.2005 og
tvey 01.01.2006 (ella eftir avtalu).
**Pedagogar, ið fáa prógv í vár eru vælkomnir at søkja.**

Lønin er sambart sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Vøggustovan er ein sjálvsognarstovnur við 35 børnum í aldrinum 1 til 3 ár. Vit hava 3 stovur og 3 til 4 starvsfólk á hvørjari stovu.

**Krøvini til tín eru:**
- At tú ert fyrikomandi og erligur.
- At tú dugir at arbeiða sjálvstøðugt og ábyrgdarfult í samráð við børn og starvsfelagar.
- At tú heldur at arbeiði í einari vøggustovu er spennandi og avbjóðandi.
- At tú dugir at síggja avbjóðingar fram um avmarkingar.
- At tú er nærverandi og dugir at lurta.
- At tú vil verða við til at menna stovnin og arbeiða við tí vit seta okkum fyri.

Vit bjóða eitt áhugavert starv, har tú sleppur at verða við til at mynda títt egna arbeiði og gerandisdagin hjá børnunum. Vit liggja í einum spennandi umhvørvi tætt við Hoyvíkstjørn og sniðgøtunum á Konmansmýru.

Meira fæst at vita við at venda sær til leiðaran Katrin Bjarnadóttir ella álitisfólkinum Jóhannu Laksá á telefon 313131.

Skrivlig umsókn skal verða okkum í hendi seinast 15.11.2005.

**Vøggustovan á Konmansmýru**
Hoyvíksvegur 41 B
FO - 100 Tórshavn

# Kunngerð

## um uttangarðsútskiftingarfund á Selatrað

Eftir lóg nr. 147 frá 27. mars 1939, seinast broytt við løgtingslóg nr. 110 frá 29. juni 1995, § 79, verður boðað til útskiftingarfund mikudagin 9. november kl. 13.00 í gamla skúla.

Til viðgerðar verður útskifting av hagapartinum Garðahagi, Innari.

Útskiftingin verður endað.

N. v.
Øssur Á. Midjord,
útsk. form.